Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um seingjadeildir á sjúkrahúsunum, settur landsstýrismanninum við heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Liggja røktarsjúklingar á seingjadeildunum á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar sjúkrahúsi og/ella Suðuroyar sjúkrahúsi, sum burdu verið á ellis- og røktarheimum ella øðrum bústovnum runt landið?
2. Um so er, hvussu nógvir av hesum røktarsjúklingum eru oman fyri 67 ár, og hvussu nógvir eru niðan fyri 67 ár?
3. Hví liggja røktarsjúklingarnir á sjúkrahúsi?
4. Hvussu leingi hava teir røktarsjúklingar ligið, sum hava ligið longst?
5. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakað fyri at loysa avbjóðingina og/ella fyribyrgja, at hetta kemur fyri?

Viðmerkingar
Vit hava fyrr fingið staðfest, at fleiri seingjarpláss á sjúkrahúsunum verða brúkt til sjúklingar, sum hava brúk fyri varandi røkt. Av tí at samfelagið ikki maktar at hýsa hesum fólkum á bústovnum ella ellisheimum, liggja tey ofta leingi á sjúkrahúsunum og bíða eftir røktarplássi. Landið hevur formligu ábyrgdina av borgarum undir 67 ár, ímeðan kommunurnar hava formligu ábyrgdina av borgarum yvir 67 á. Lagt er eisini upp til samstarv millum geirarnar.

Vert er at fáa staðfest, um støðan á økinum er batnað. Henda keðiliga støða krevur nógv av heilsuverkinum, men ikki minni av næstringunum hjá teimum røktarkrevjandi. Tí seti eg landsstýrismanninum henda fyrispurning.

Á Løgtingi, 16. februar 2021

Jóhannis Joensen